## DAGSINS MEINING

# Sunnur búskapur?

Ein afturvendandi pástandur í valsstríði Tjóðveldisflokkurin er, at Føroyar hava ein sunnan búskap, og at hetta kunnu føroyingar takka Karsten Hansen fyri. Búskapur snýr seg um annað og meira enn landsins fíggjarlóg. Búskapurin fevnir um vinnulív sum heild, herundir fiskivinnu á sjógvi og landi, almennar fyirtøkur, landsfyritøkur, fíggjarstovnarnar og almennu fíggjarviðurskiftini eitt nú landsins fíggjarlóg. Spuringurin, sum mong seta sær í hesum døgum, er hesin: er øll henda skipan frísk og sunn? Hvussu sunn er alivinnan á sjógvi? Hvussu sunn er alivinnan á landi og í hesum sambandi: hvussu sunnar eru tær vinnur, sum eru tengdar at alivinnuni á sjógvi og á landi? Hvussu sunn er rækjuvinnan á sjógvi? Hvussu sunn er flakavinnan? Hvussu sunnur er føroyski fíggjarheimurin? Hvussu sunnur er skipasmiðjuídnaðurin? Hvussu er støðan í KT-vinnuni?

Soleiðis kundu vit og mong við okkum hildið áfram við at spurt. Tað skuldi ikki verið neyðugt her at gjørt eina roynd at finna tey røttu svarini, tí tey, sum pástanda, at øll henda skipan er sunn, kenna svarini betur enn vit. Tey hava jú meira enn nakar annar havt fingurin á pulsinum. Men tey pástanda treystliga og uttan at blunka, at øll skipanin er sunn. Ja., vit skulu enntá vera errin og stolt av støðuni!

Hvussu stendur so í roynd og veru til við øllum búskapinum? Jú, alivinnan er fokin og við henni fara aðrar vinnugreinir, sum eru tengdar at henni. Rækjuvinnan stendur á gravarbakka, og flakavinnan á landi er komin á fallandi føti í og við, at flestu virki framleiða við halli. Hvussu fíggjarheimurin hevur tað, vit vita ikki, men alt bendir á, at avlopið 2003 verður ikki í nánd av tí, vit hava sæð áður. Kanska einki. Uppsagnir og skerjingar í virksemi eru beiskur veruleiki. Tann einasti partur av skipanini, ið tykist hava tað gott, er landskassin. Tað almenna eigur tvær milliardir á bók, fáa vit at vita í tíð og ótíð. Hví eigur tað almenna tvær milliardir á bók? Jú, tí vit nú í eini fimm seks ár hava havt heimsins størsta skattatrýst, so einfalt er tað!

Hví er tað komið so langt út við búskapinum? Tað er ilt at svara, men tað tykist, sum fleiri orsøkir eru til hesa vanlukku støðu. Eitt er, at Tjóðveldisflokkurin treiskliga hevur hildið fast um ein ultraliberalistiskan búskaparpolitikk, har tað hevur verið altumráðandi, at frælsu marknaðarkreftirnar eina skuldu ráða. Ein onnur orsøk er ivaleyst, at landsstýrið hevur verið lammað av innanhýsis klandri og ósemjum. Ein og hvør búskaparlig skipan krevur eitt neyvt samstarv millum fíggjarmálaráð og vinnumálaráð. Hetta samstarv hevur ikki verið til hesi seinastu árini. Høgra hond hevur ikki vitað, hvat vinstra hond gjørdi. Her hevur als eingin samskipan av teimum ymsu búskaparpolitisku amboðum verið til staðar. Nú hava havt eitt fólkaflokslandsstýri og eitt tjóðveldislandsstýri, so einfalt er tað. Nú svíður sum svøllur, og tað svíður sum vanligt til tann vanliga føroyingin. Uppsagnir í hópatali eru framdar ella eru á veg. Ótryggleiki eyðkennir aftur gerandisdagin hjá starvsmonnum og verkafólki í Føroyum. So kunnu flokkar tosa um sunnan búskap, so leingi teimum lystir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Áðrenn Kyoto kjakið fer heilt út av lagi í valstríðnum!

**Lena Lastein**

Í sambandi við støðutakuna til Kyoto-protokollina (protokol undir Klima-sáttmálina) er enn ikki kannað hvussu treytirnar fyri minkingarnar (prosenttal) verða fyri Føroyar og tískil ber ikki til at taka støðu, hvørki fyri ella ímóti protokollina fyri enn tey eru staðfest. Tí mugu teir politikskar flokkarnir fyrst av øllum taka støðu til um teir ætla sær at fáa set hesar kanningar í verk og um so er, hvussu og hvør skullu hava ábyrgdina av tí. Sjálvandi skullu við samráðast um minkingar grundaðar á umstøðunum at fremja minkingar í Føroyum (t.v.s atlit skal takast til útlátsmongdir, fíggjarlig viðurskifti, orkukeldumøguleikarnar í landinum, v.m.) akkurat sum danar í síðnari tíð samráddust út frá teirra umstøður at minka um útlátini.

Løgtingið hevur samtykt Klima-sáttmálan (áleggur londini at arbeiða fyri at minka um útlátini, men ikki við eitt ávist prosenttal) sum ein partur av donsku ríkinum og er okkara støðu í sambandi við Kyoto-protokollina (minkingar við eitt ásett prosenttal í mun til útlátini í 1990) treytað av tí.( Kanska vit fyrst av øllum skullu taka støðu til um vit yvirhøvuð ætla okkum at útinna Klima-sáttmálan, sum Løgtingið longu hava samtykt?). Um Løgtingið framhaldandi ætla okkum at verða bundin til Klima-sáttmálan saman við Danmark skullu við samráðast um minkingar við Danmark. Um Løgtingið afturímóti broytir samtiktin av Klima-sáttmálan til at verða sum eitt sjálvstýrandi øki skullu vit samráðast um prosent minkingar beinleiðis við UNFCCC. Ongin hevur kannað hesu viðurskifti og tey verða als ikki umrødd hóast tey hava alstóran tydning fyri okkara leiklut í royndunum at minka um árini av útlátini av veðurlagsgassi.

Kyoto protokollin fevnir um at heimsins lond í felag tekur ábyrgd av at minka um útlátini av veðurlagsgassi við eitt samlað prosenttal. Hjá okkum í Føroyum verður tað helst ein spurningur um hugburð í sambandi við nýtslu av orku ið dálka umhvørvið, og um samkensla við fólk í heiminum sum verða rakt av ovurdálkina av lufthavinum.

# Hey, tit í Sambandsflokkinun!

**Petur Johannesen**

Kann ikki lata vera við at seta tykkum ein stuttan og einfaldan spurning viðv. førda fíggjarpolitikkinum hjá undanfarna landsstýri og tykkara egna boð uppá sama. Tað er neyvan nøkur loyna, at tit líka síðan 1998 hava verið mótstøðufólk av førda fíggjarpolitikkinum her í landinum, sum hevur høvuðsábyrgdina av at vit nú megna at gjalda egnar rokningar. Eitt nú hava tey bæði ungu flogvitini hjá tykkum á tingi, Bárður N. og Johan Dahl nú skrivað so mong lesarabrøv um fíggjarpolitik, at teir báðir eftir mínum tykki áttu at sett beina kós eftir Nobelvirðislønini í búskapi - og tað gjarna í felag. Fíggjarpolitikkurin hevur snøgt sagt áhaldandi og við lítlum haldi í veruleikanum verið "rakkaður niður". Hetta hóast vit øll vita, at føroyski búskapurin sjáldan hevur staðið á tryggari kletti enn júst nú. Heilt stutt kunnu nevnast metstóra innistandandi í landsbankanum (til at standa ímóti við í verri tíðum) og uttanlandaskuldin, som nú er vend til nettoogn uttanlands.

Fyri at taka eitt av sjónarmiðunum fram, hava tey bæði flogvitini td. skrivað at tær almennu lønarútreiðslurnar eru vaksnar við ikki minni enn 8,7 pct. í miðal um árið (rætta talið er tó 8,1 pct. í miðal um árið, men lat tað fara) fram til 2002. Men teir gloyma í sama viðfangi at nevna, at lønarútreiðslurnar hjá tí almenna at kalla stóðu í stað í tíðarskeiðnum 1989-97 og fyri slettis ikki at tala um, hvussu illa niðurpínt alt tað føroyska samfelagið (eisini lønarlagið) var í 1998 orsakað av kreppuni. Løgið er eisini, at teir gloyma at nevna allar teir mongu batarnar, ið framdir hava verið her á landi síðan 1998 (td. á almannaøkinum, nýggjan smyril og teista, landssjúkrahús, vágatunnil o.s.fr.), og sum undanfarin landsstýri bert kunnu droyma um at hava framt. Harafturat gloyma teir at nevna, at máttloysisblokkurin nú einans telur 6% av samlaðu framleiðsluni her á landi. Vit eru við øðrum orðum vorðin munandi meira sjálvbjargin síðan

1998, samstundis sum allir teir mongu batarnir eru framdir. Eg veit væl av, av Sambandsflokkurin livir av ampa, men tit máttu kunnað um ikki annað so bara roynt at hildið tykkum til veruleikan. Ein onnur andsøgn í tí, sum tey bæði flogvitini bera fram er, at teir halda lítið um, at yvirskotið á fíggjarlógini nú er tódnað, samstundis sum at teir eftirlýsa konjunkturpolitik (!). Hvar er logikkurin?

So til spurningin. Hvat halda tykkara búskaparorakkul, Magni Laksáfoss og aðrir (sum búskaparfrøðingar), um td. hesi bæði uppskotini (kundi funnið mong slík. Td. kundi eg spurt um ynskið hjá M. Dam um 1000 p-básar við flogvøllin) frá tykkara tingmanning:

- Uppskotið um at stuðla rækjuvinnuni og venda aftur til studningsbúskapin, ið vit kenna alt ov væl?
- Og so mítt favoritt-uppskot: at flyta 800 mió kr. úr landsbankanum í "ein samhaldsfasta"?

…ella sagt á annan hátt: eru hesi bæði uppskot tykkara boð uppá sunnan fíggjarpolitik, ella fari eg skeivur her...???

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Kann nakar svara hesum spurningum

**Jóhan Carl Dam**
*arbeiðari*



Seinastu tíðina hevur nógv verið tosað um tað, at hópurin av fremmandari arbeiðsmegi, sum kemur til Føroya, er alsamt vaksandi. Tosað hevur verið um, um tað nú er so heppið, at púra fremmand og ókend fólk taka arbeiðsuppgávur úr hondunum á føroyingum. Tosað hevur verið um, hvørjar avleiðingarnar eru ella kunnu verða av, at so nógv fremmand fólk koma og búleikast í okkara lítla landi. Fólk við øðrvísi hugsanum, øðrvísi mentan, siðalæru o.s.fr. Tosað hevur verið um, hví hesi fólk eru so nógv meira attraktiv fyri okkara arbeiðsgevarar. Um tey duga so nógv betur, ella um tey bara eru bíligari og lættari at hava við at gera? Og so hava nógv eisini hugleitt um, hvussu hesi fólkini hava tað, meðan tey eru í Føroyum. Kanska ikki so nógv í arbeiðstíðini men uttan fyri hesa. Hvussu búgva tey? Hvørjar sømdir og hvørji rættindi hava tey annars? Eru tey tryggjað á nakran hátt? Í mun til óhapp, sjúku ella arbeiðsloysi?

**Hvussu væl kennir arbeiðsgevarin hesi fólkini**
Nógv eru, sum spyrja, hvussu væl arbeiðsgevarin kennir hesi fremmandu arbeiðsfólkini. Til teirra arbeiðsevnir og førleikar. Eru tey betri arbeiðsmegi og meira álítandi enn tann føroyska? Kenna hesi fólkini nakað til tær treytir, sum settar eru vørunum, tey eru við til at framleiða?

Skulu vit trúgva stjóranum í Føroya Fiskavirking, Meinhardi Jacobsen, so innflyta arbeiðsgevarar fremmanda arbeiðsmegi, tí tann føroyska er ikki nýtilig. Er tað so? Er tað so, at teir føroyingar, sum hava arbeitt á flakavirkjum seinastu hálvtrýss árini, ikki hava dugað sítt arbeiði? Ella er hesin ódugnaskapur brádliga íkomin? Ella er tað so, at føroyska arbeiðsmegin ikki er nóg álítandi? Og nær er tað so hent?

Stjórin á Fiskavirking sigur, at føroyingar er ikki nóg fimhentir. Tað kann vera, at ein kann finna 100 asiatar, sum eru fimhentari enn føroyingar, tí teir verða valdir millum milliardir. Hin vegin stendur tað rimmarfast, at føroyingurin vanliga er rættiliga fittur í hondum, og dugi eg ikki at skilja, at Meinard ikki kann finna fimhentar føroyingar. Nei, trupulleikin er helst tann, at Meinhard og aðrir arbeiðsgevarar ikki vilja nýta orku og pening upp á at gera arbeiðsuppgávuna attraktiva, ikki vilja nýta orku og pening upp á at útbúgva arbeiðsfólkið. Fyri mær at síggja, skuldi førleikamenning av okkara starvsfólkum verið ein sjálvsagdur hornasteinur í royndunum at betra um góðskuna og harvið eisini inntøkuna hjá virkinum. Men Meinhard og hinir hugsa bert um at fáa sum mest fyri vøruna. Tí hugsa teir meira um lágan framleiðslukostnað enn førleikamenning og vørugóðsking.

Og tí eru vit esini nógv, sum hava illgruna um, at fremsta ætlanin við at innflyta fremmanda arbeiðsmegi er ein lækking av lønar- og øðrum hugsandi útreiðslum.

**Hvat vita myndugleikarnir**
Hvat vita myndugleikarnir um hesi fremmandu fólkini, ið eru í ferð við at herseta okkara flakavirki? Er tað nakar myndugleikapersónur, sum hugsar ein einasta tanka hesum viðvíkjandi? Eg veit ikki, men eg haldi, at tíðin er komin at hugsa, og at hugsa skjótt.

Talið á fólkum, sum hava fingið arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum er vaksið við 200% eftir heilt fáum árum, og er tað eingin sum hugsar og eisini ger nakað, so fer talið at vaksa við vaksandi ferð.

Nú vóni eg, at lesarar av hesi grein ikki skilja hana sum álop á fremmand arbeiðsfólk í Føroyum. Sjálvsagt eru tey eins og vit. Ymisk á ymiskan hátt. Orsøkin til hetta skriv er tí ikki eitt álop á tey men meira ein ávaring ímóti, at hesi fólk møguliga eru reiðskapur í hondunum á spekulantum, sum eirindaleyst útnytta tey til egnan vinning. Somu spekulantar aftra seg eftir øllum at døma ikki við at ofra føroyskar arbeiðarar í somu tráðan eftir vinningi. Eg havi tó hug at seta okkara myndugleikum nakrar spurningar um, hvussu væl teir eru kunnaðir um hesi fremmandu.

Hvussu væl kenna okkara myndugleikar (í hesum føri teir donsku) hesi fólkini? Viðvíkjandi heilsustøðu. Likamliga og sálarliga. Eru tey smittuberar av onkrum slagi? Nýta tey stoffir? Eru umstøður teirra í heimlandinum kannaðar? Kenna tit fortíð teirra? Ella lata tit bara øll, sum vilja, koma inn í land okkara? Ganga tit á henda hátt ørindi fyri spekulantarnar? Er løtuvinningur arbeiðsgevaranna av størri týdningi enn trivnaður føroyinga? Arbeiðsgevarar hugsa ikki um møguligar avleiðingar fyri land og fólk upp á sikt. Gera myndugleikarnir tað? Er tað nakar viðkomandi myndugleiki, sum bert eina løtu hugsar fyrimunir kontra vansum við stórari fremmandari arbeiðsmegi her á landi?

**Hvat verður tað næsta**
Tað tykist, sum hevur hugburðurin um, at vinningur arbeiðsgevarans skal ganga fram um tilveru og trivnað arbeiðaranna, ja fram um alt annað, eisini fingið fastatøkur her á landi. Alt verður loyvt, bert tað gagnar kapitalinum. Og nógv eru við mær sum ræðast, at søgan endar ikki her. Aðrir fáa sama hugskot, og skjótt er allur arbeiðsmarknaðurin, á sjógvi sum á landi, væl mannaður við fremmandar arbeiðsmegi. Sum ikki bara er bíligari, men sum eisini letur sær nógv meira lynda enn føroyingurin. Tann fremmandi er kanska vanur við trælakor, og setur hann tí ikki nevniverd krøv. Bert hann fær løn, nakað av mati og tak yvir høvdið, ja, so er tilvera hansara batnað við fleiri hundrað prosentum. Hesum ger tann føroyski arbeiðsgevarin sær dælt av.

Spurningurin er tó, um føroyski arbeiðarin skal lata sær hesum lynda? Um føroyingurin skal tað?

**Provokeri**
Sum lesarin helst hevur skilt, so er greinin skrivað á rættiliga provokerandi hátt. Kanska kenna bæði arbeiðsgevarar og fremmand arbeiðsfólk seg illa viðfarin í greinini. Tað hevur sum sagt ikki verið mín ætlan at niðurgera fremmand arbeiðsfólk í Føroyum. Bert haldi eg tað vera neyðugt at rópa varskó í tøkum tíma. Um arbeiðsgevarin kennir seg bitnan í afturpartin, so skal eg heilsa og siga, at tað eri eg fegin um. Bert vóni eg, at bitið í sama aftur part fær arbeiðsgevaran at vakna og støðga á, aðrenn hann letur allar føroyskar arbeiðarar upp fyri skutil. Heldur skuldi arbeiðsgevarin hugsað um at dagført og førleikament føroysku arbeiðsmegina.

Um nakar myndugleikapersónur lesur greinina, so skal tað vera mín vón, at hesin og aðrir myndugleikapersónar síggja álvaran og gera nakað við hann.

Annars fari eg at ynskja øllum føroyskum sum fremmandum arbeiðarum her á landi gott nýggjár. Somu heilsan fáa arbeiðsgevarar og myndugleikar.

Fari at enda skrivið við eini bøn um, at onkur kann geva mær eitt sakligt og skilagott svar upp á teir spurningar, sum settir eru fram í hesum skrivi.

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

# Nýggir vandar, nýggir vindar?

**Rolf Guttesen**
*21.01.03*



Tann nationalistiska øsingin sum tók seg upp fyri 6-7 árum síðani, er vend til eina pessimistiska kúring og lúring, sum oftast fylgir einum innantómum upplopi. Á heimasíðuni hjá Unga Tjóðveldinum vóru í 2002 umleið 32 kjakinnlegg, men í 2003 vóru alt árið bert 2, sum mest snúðu seg um krav um nýggja nevnd.

**Einki paradís í eygsjón**
Unga fólkið, og onnur við, hava mist hugin og tíma ikki at hoyra meira oyrnagass um paradísið, sum skuldi blóma í 1000 ár.

Farandi samgonga hevur lítið og einki fingið av skafti. Er nakað stórmál at vísa á? Eg nøkur grundbroyting hend? Ikki so frægt sum eitt grundlógaruppskot, ella ein fólkakirkja, sum er yvirtikin.

**Blokkurin farin**
Tað størsta er kanska, at ein triðingur av blokkinum er farin. Summi fegnast og siga, at allur studningur ger skaða. Tað valdast. Verður peningur ella studningur brúktur við skili, kann hann gera stóra nyttu, eisini blokkurin. Ger hann skaða, so er tað av politiskum ódugnaskapi.

Onnur tosa um peningarenslið millum Føroyar og Danmark, og siga at allur peningur í síðsta enda legst í Danmark. Og teir halda tað vera eitt frálíkt politiskt argument. Nú er tað so, at peningur ikki "endar" á nøkrum stað, men nettup sirkulerar allatíðina.

Nógv hevur verid tosað gjøgnum árini um bygdamenning, økismenning. Nú er enntá ein heilur stovnur sum kannar økismenning. men aðrir og størri vandar eru fyri framman, en at fólkatalið ikki veksur í øllum útoyggjum.

**Fiskivinnan í vanda**
Eg keypti herfyri ein pakka av leysfrystum fiskaflaki í einum Kvikly-handli í Danmark. Góður, pent skorin, hvítur fiskur fyri 33 kr/kg. Made in China. Tilsvarandi vøra úr Danmark ella Føroyum kostar 70 til 90 kr/kg. Fer framtíðin at útkonkurrera føroyskan fisk? Hvussu nógv bein eru so eftir at standa á?

Alivinnan hevur tað ikki serliga gott, og haraftrat vísa kanningar, at alifiskur er fullur í skaðiligum stoffum. Hesi tíðindi fara helst ikki at fremja eftirspurningin. Hvussu við rækjuvinnuni, sum einaferð var hønan, sum varp gullegg. So er ikki longur.

**Óstabilt, stórorðað stýri**
Rumbul hevur verið í landsstýrinum alla tíðina. Óstabilitetur hevur verið eyðkennið. Landsstýrismenn og -kvinnur eru skiftir/-ar út sum ongantíð fyrr. Gomul lík í lastini eru komin undan kavi, embætisførslan hevur verið ólóglig, ella lóglig - og tað kann so eisini vera skeivt. Løgmaður og varaløggur hava ikki tosað saman í nøkrum konstruktivum "samgonguanda" í fleiri ár. Og so skuldu tað verið teir báðir, sum førdu fólki inn í 1000-ára fullveldið? Heldur hevur einaferð næstan verið statskupp, hinaferð løgmaður var á ferð í Englandi.

**Nýggir møguleikar**
Nýggj orð hoyrast í orðaskiftinum. Tað "góða samfelagið", hetta bendir á ein hugsunarhátt, sum hevur støði í samfelagnum, so sum tað er. Lat okkum á praktiskan hátt fara til arbeiðis og orðna problemini, so sum tey eru. Tann flokkur, sum kanska hevur gjøgnumført størstu sjálvrannsakan, er kanska sambandsflokkurin, sum nú hevur eitt "nýskipanaruppskot" til at avloysa gomlu Heimastýris-lógina. Man ikki hetta kunna sameinast við "sjálvstýrislógaruppskotið" hjá Javnaðarflokkinum.